# Skúlastýrisfundur 7. apríl 2026

**Staður:** Við Gøtugjógv
**Tíð:** 16:00 – 19:00

**Møtt:** Eydna Lucia Nesá, Katrin I. Gregersen, Elinborg Osvaldsdóttir, Unn Jarnskor, Elisabeth Hansen og Atli F. Johansen
**Ikki møtt:** Tórur Didrik Djurhuus

### 1. Góðkenning av fundarfrásøgn frá fundi 4. februar 2026

Eydna Lucia las upp fundarfrásøgnina, sum varð góðkend av limunum í skúlastýrinum.

### 2. Leiðslan kunnar

Handverk og list er liðugt fyri í ár. Vit hava sitið og arbeitt við at skipa tað øðrvísi, men okkara avmarkingar eru, at kreativa hølið er ov lítið.

Planleggingarnar til komandi skúlaár eru í gongd. Starvsfólk hava givið ynski um, hvat tey ynskja sær til komandi ár. Leiðslan arbeiðir við einum leisti, sum ger, at skúladagarnir í komandi skúlaári verða eitt sindur styttir. Hetta verður gjørt fyri at fáa tímar til onnur átøk á skúlanum, sum væntandi kunnu betra trivnaðin. Eisini verða fleiri tvílæraratímar komandi skúlaár.

Næmingar hava luttikið í talvkapping, og tað gekk væl.

Starvsfólk hava fingið at vita, at skúlin hevur keypt 24 nýggjar teldur, sum tey vóru sera glað fyri.

### 3. Uppfylging upp á mál frá 7. apríl

Spurt varð um støðuna í ymiskum málum. Niðanfyri eru svarini:

- **Útiøkið:** Skúlastýrið hevur søkt um kunning frá kommununi. Nú arbeiðið so smátt er farið í gongd, verður roynt at veita betri kunning.
- **1929-skúlin:** Skúlastýrið fær kunning um standin á byggninginum á fundi í nærmastu framtíð.

- **Glashurðin:** Hurðin er ikki bílig, og pengar eru ikki tøkir til hana í ár.
- **Byggifundir:** Leiðslan ynskir at luttaka, men kommunan metir ikki, at tað er neyðugt í verandi løtu.

### 4. Eftirmeting av starvsfólkafundinum 4. mai 2026

Fundurin var sera góður. Jóhanna Andreasen dugdi væl at fanga starvsfólkini. Starvsfólkini høvdu nógv gott at bera fram bæði um fyrilesturin og matin.

Nógvur matur var eftir. Bílagt varð til 40 fólk, men næstu ferð er kanska nóg mikið at bíleggja til 30.

### 5. Evni til skúlastýrisfund saman við Fuglafjarðar skúla

Skráin er móttikin og sær góð út. Metið verður ikki, at tørvur er á at leggja nakað afturat.

### 6. Hvat ynskir skúlastýrið at fáa avgreitt seinni hálvu 2026

- Útiøkið í Leirvík
- Ferðslutrygd við skúlarnar
- Glashurðin í Leirvík
- Skelting úti og inni, serliga í Leirvík
- 1929-skúlin við Gøtugjógv
- Skunda undir at fáa arbeiðsbólkin til um- og útbygging av skúlanum við Gøtugjógv í gongd

### 7. Ymiskt

Eydna Lucia spurdi um støðuna hjá foreldraráðunum. Skúlastýrið metir, at arbeiðið gongur væl. Kortini manglar ein samskipari, tí Poula á Líðarenda hevur røkt leiklutin longri enn ætlað var.

Skotið varð upp at hava ein fund mitt í september, har ein nýggjur samskipari verður valdur.

**Næsti skúlastýrisfundur:**

11. mai kl. 18.30 í Fuglafirði

**Fyrsti fundur eftir summarfrítíðina:**

1. september 2026 kl. 17.00 í Leirvík